Yngd í ár 2000

Gott n‡ggjár

So var Yngd endiliga aftur í bla›num, og vit vóna, at tit eru komin væl inn í ár 2000. Sum kunnugt kom Yngd ikki út fyrsta mikudagin eftir ársskifti›, tí trupulleikar - tó ikki ár 2000 trupulleikar - stungu seg upp.

Vit hava sett skjøtil á eina n‡ggja øld. Ja, eitt n‡tt ár túsund.

Men samstundis, sum eitt n‡tt tí›arskei› er byrja› í søgu okkara, so fer Yngd eisini undir eina n‡ggja byrjan.

N‡tt fólk er sett í starv á Yngd redaktiónini, og hetta kemur sjálvandi at merkjast. Einamest fyrstu tí›ina, sum tí kanska ver›ur meira merkt av byrjunartrupulleikum. Men vónandi bera lesarar okkara yvir vi› okkum.

Tær gó›u gomlu kreftirnar koma tó eisini at hava sína ávirkan á, hvussu bla›i› kemur at síggja út, og er hetta bert at fegnast um.

Men hvat hevur Yngd so at bjó›a lesarum sínum hetta komandi ári›.

Jú, málsetningurin er grei›ur. Mi›a› ver›ur alla tí›ina ímóti at menna bla›i›, solei›is, at Yngd gerst eitt meira livandi og spennandi bla›, sum fyrst og fremst er ætla› yngru lesarunum hjá Sosialinum.

Innihaldi› í bla›num kemur at spenna ví›a. Ætlanin er, at vit taka upp naka› av tí, sum rørir seg millum ungdómin í Føroyum í dag. Eitt evni, sum Yngd sær at vera av stórum t‡dningi er at kunna um útbúgvingarmøguleikar hjá ungdómi okkara. Ætlanin er, at vit í komandi blø›um fara at gera serliga nógv burtur úr júst hesum evni.

Framtí›arvánirnar hjá ungfólki her á landi, kanska serliga í mun til fullveldi›/ikki fullveldi›, er eisini naka›, sum vit hava ætlanir at fara undir at skriva.

Tónleikur kemur at hava ein stóran leiklut í Yngd, tá hugsa› ver›ur um, at vit í hvørjum bla›i koma at umrø›a nakrar av n‡ggjastu fløgunum á markna›inum, umframt at hitlistarnir, sum eru partar av tættunum í Yngd hvørja viku, eisini koma at seta sín dám á bla›i›.

Tættir eru, sum heild, ein stórur partur av slíkum bla›i, og er Yngd heldur onki undantak í so máta. Tí fara vit at geva pláss fyri vælumtókta táttinum “Svara so”. Hetta eru 20 spurningar Yngd setir til kend andlit hvørja viku.

Pláss ver›ur tó eisini gjørt fyri ø›rum tilfari í bla›num. Nøkur av evnunum, sum eisini koma at seta sín dám á bla›i› eru, kærleiki og kærleikstrupulleikar hjá ungum, og trúgv og samkomur, bert fyri at geva eitt bo› uppá, hvat tit eisini kunnu vænta› tykkum í framtí›ini. Hetta síggja vit sum nøkur sera stór evnir at fara undir, men eftir fleiri áheitanir hava vit gjørt av at royna kortini.

Vit hava eisini fingi› fleiri fyrispurningar vi›víkjandi teimum smærru plássunum í landinum. Summi vilja vera vi›, at Yngd ikki stígur fótin út um Havnina. Ta› er rætt, at vit í kanska í so stóran mun, ikki hava røkt uppgávur okkara á smærru plássunum nóg væl, men síggja vit hetta sum eina stóra og t‡dningarmikla uppgávu hjá bla›num. Men ta› slepst ikki undan, at lyklaor›ini í hesum sambandi eru tí› og orka. Men vit fara at royna okkara besta. Sjálvandi.

Brævbumban stendur tó IKKI til at bresta í løtuni, men ta› er okkara mál, at ta› eigur at standa tykkum frítt í bo›i at skriva inn til Yngd. Vit vilja fegin hoyra júst tykkara meiningar, rís, rós, ella hvat ta› skal vera. Ella tit kanska hava eitthvørt uppá hjarta, sum tit fegin vilja hava vi› í bla›i›. Ta› er ikki at smæ›ast burtur. Tit eru hinvegin meira enn vælkomin til at senda tilfar til Yngd. Tit fáa fatur á okkum allar vanligar gerandisdagar frá 8 - 16 á telefon 311820 og fax nummari er 314720. Teldupostadressan er: yngd@sosialurin.fo.

Til ber eisini at senda okkum vanligan post. Hetta gera tit vi› at senda bræv tykkara til: Tí›indabla›i› Sosialurin, Argjarvegur 26, postboks 76, 110 Tórshavn.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan müller

Bla›stjórn:
Jákup Bogi Joensen

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd
í Sosialinum
Hvønn mikudag

Fekk teldubræv frá víðagitnum tónleikara

Nakað herfyri fekk 20 ára gamli Bárður Háberg úr Havn eitt teldubræv frá víðagitnum tónleikara



From: jjoliver@aol.com
To: bardur@hotmail.com

B r ur

Thanks for teh support !!
We are touring Europe this coming October/November, and I think we will be doing some Scandinavina dates... so I guess there«s a possibiliity we could play the Faroe Islands. It«s ultimately up to the promoters.. but if you van find the promoter that booked TOTO, and they are interested in booking us, then please connect them with me here, and I will immediatly connect them with our agensy. I would love to play somwhere new...
By the way, the mew Play-Along book/cd is shipping, and we can ship anywhere. So, if you«re interested, checkout the website for info... theplayerscircle.com

Thanks again, B r ur

- jay

Jákup Bogi Joensen

Ta› er ikki á hvørjum degi, at føroyingur fær teldubræv frá ví›agitnum tónleikara. Men hetta upplivdi 20 ára gamli Bár›ur Háberg úr Havn herfyri. Talan er um eitt teldubræv frá tónleikaranum, Jay Oliver, sum tey flestu, vi› áhuga fyri tónleiki, kenna úr bólkinum hjá kenda trummusláaranum, David Weckl.

Bár›ur Háberg var sum vera man ovurfegin, tá hann fekk teldubrævi› frá Jay Oliver.

- Eg sat og spældi mær vi› interneti›, tá eg kom fram á heimasí›una hjá Jay Oliver og David Weckl. Eg royndi eydnuna, og skriva›i Oliver eitt bræv.

Í brævi sínum greiddi Bár›ur frá áhuga sínum fyri tónleiki, og seinast hev›i Bár›ur ein fyrispurning til Jay Oliver , um ta› ikki kundi veri› eitt hugskot hjá honum og hansara tónleikarum at komi til Føroya.

Ta› gingu bert fáir dagar, so fekk Bár›ur bræv aftur frá Oliver.

Í brævinum seg›i Oliver millum anna›, at um Bár›ur kundi funni› fram til teir, sum fingu Toto til Føroya at spæla, og sí›ani fáa teir at seta seg í samband vi› seg, so kundi› ta› væl veri› møguligt, at hann kom til Føroya at spæla.

Oliver seg›i eisini, at honum dámar væl at spæla n‡ggj og ø›rvísi stø›, har hann ongantí› hevur veri› á›ur, og tí kundu Føroyar veri› eitt frálíkt høvi› til tess.

Sum Yngd skilir, so vóru ávísar samrá›ingar millum David Weckl band, sum Jay Oliver er partur av, og ta›, sum tá æt FC bú›in. Táverandi lei›arin í FC bú›ini, hann eitur Finn Jensen, váttar fyri Yngd, at samrá›ingar vóru millum partarnar. Men hann leggur aftrat, at hann fór ikki at taka kjansin vi› at fáa David Weckl band til Føroya, fyri at spæla fyri 300 føroyskum tónleikarum. Harvi› meinar Finn Jensen, at David Weckl band ikki er eins tiltrekkjandi fyri føroyskar áhoyrarar, sum eitt nú Toto eru ta›.

Finn Jensen vísir tó á, at David Weckl band er ein frálíkur bólkur og kundi møguliga veri› eitt gott íkast til jazz-festivalin.

Jay Oliver er kanska ikki hin mest kendi tónleikarin millum føroyskan ungdóm, men úti í heimi er hann ein sera kendur og nógv virdur tónleikari.

Listin er nærum óendaligur, men skulu vit fara at nevna nakrar av teimum tónleikarum og bólkum, sum Oliver hevur spælt vi›, so kunnu vit nevna guitarleikaran, Peter Mayer og bólkin Air Play. Millum mest spennandi nøvnini kunnu vit nevna Sheryl Crow. Hann eigur so avgjørt sín lut í, at hon er vor›in so kend ví›a um, og hann er kanska størsta orsøk til, at hon hevur vunni› sær so stóran hei›ur og æru. Ta› var nevnliga Oliver, sum fann fram til Sheryl Crow, og fekk hana so langt fram á altjó›a tónleikapallin.